

*Tíðin er farin frá at brúka felagskalik, tá ið altargongd er, heldur Jógvan Fríðrikson, bispur. men tað er ein niðurstøða hann er komin til langt áðrenn svínakrím fór at ganga, tí tað er onki nýtt, at føroyska kirkjan hugsar nógv um reinføri*

# Kirkjan fer kanska at umrøða svínakrím

**Tað er onki nýtt at kirkjan leggur dent á reinføri, men tað er væl møguligt, at vit eisini fara at geva ávísar leiðreglur fyri at forða svínakrími at spjaða seg, sigur Jógvan Fríðriksson, bispur**

SVÍNAKRÍM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Í føroysku fólkakirkjuni hava vit ikki umrøtt støðuna viðvíkjandi svínakrími. Men tað kann henda, at hetta er ein spurningur, vit fara at taka upp, fyri at kirkjan eisini kann gera sítt til at forða fyri smittuspjaðing.

Tað sigur Jógvan Fríðrikson, bispur.

Í gjár fréttist, at kirkjuligir myndugleikar í stóra Bretlandi hava gjørt leiðreglur fyri, hvussu kirkjan skal bera seg at fyri at forða svínakrími í at spjaða seg.

Í hesum sambandi verður mælt frá at brúka felags kalik, tá ið altargongd er.

Jógvan Fríðrikson sigur, at hetta er ikki ein spurningur, sum er viðgjørdur í føroysku fólkakirkjuni.

Men tað verður kanska tikið upp, leggur hann afturat.

### Tíðin farin frá felagskaliki

Hinvegin staðfestir hann, at eftir hansara tykki er tíðin farin frá felagskaliki og tí mælir hann til at allr kirkjur fara yvir til at brúka serkalikar.

Hann heldur, at er tað ein figgjarligur spurningur, ber til at brúka einnýtisløs úr plasti í fyrstuni. Kortini heldur hann eisini, at tað, sum brúkt verður í altargongini eigur at avspegla álvaran og tignina í gerðini og tí heldur hann ikki, at einnýtisgløs eru ein varandi loysn, men í eini skiftistíð er onki í vegin fyri tí.

Hinvegin legur bispur dent á, at tað er einki nýtt, at føroyska kirkjan er ógvuliga tilvitað um at hava reinførið í hásæti og tí verður farið væl um kalikar og alt annað, sum brúkt verður.

Annars eru tað ógvuliga fáar kirkjur eftir, sum brúka felags kalik, men tað verður gjørt, heldur hann, at tað eigur at verða skift til serkalik.

### Stórur munur á altargongd

Annars vísir hann eisini á, at altargongd í bretsku kirkjuni er nógv øðrvísi enn her hjá okkum.

Í føroysku kirkjuni er altargongd ikki hvønn sunnudag og tað er heldur ikki alt kirkjufólki, sum er til altars.

Í bretsku kirkjuni er altargongd hvønn sunnudag og eisini gerandisdagar og har er alt kirkjufólki til altars og tey brúka felags kalik.

Tí er talan um ein heilt annan smittuvanda enn í føroysku kirkjuni.

Bispur heldur eisini, at smittuvandin av eini krímsjúku skal takast í álvara.

- Vit fara at lurta eftir teimum tilráðingum, sum landslæknin kemur við, men tað er eisini ógvuliga umráðandi, at kirkjan ikki leypir ótta á fólk.

- Sjálvandi er tað ringt at fáa krímsjúku, men tað er líka ringt at verða so sjúk í lívinum, at vit ikki torir at liva, sigur Jógvan Fríðriksson.

## Ólavsøku-gudstænasta ikki í vanda

Gudstænastan á ólavsøku verður sum ætlað.

Tað staðfestir Jógvan Fríðrikson, bispur.

Hann sigur, at millum manna hava røddir verið frammi um at avlýsa ólavsøkugudstænatuna fyri at forða fyri at svínakrím spjaðir seg.

Hugsað hevur verið um, at smittuvandin er serliga stórur á ólavsøkugudstænastuni við eini rokaðari krikju.

Men bispur staðfestir, at tað verður av ongum, at hon verður avlýst.

- Tað verður ikki uttan so, at landslæknin beinleiðis áleggur okkum at seta heilt serlig tiltøk í verk, sum mugu metast sum ein undantaksstøða av læknafrøðiligum orsøkum fyri at forða fyri smittuspjaðing, sigur hann.


BALLUPRESSUR
FÁIÐ SLÁTTURIN SKJÓTT OG VÆL FRÁ HONDINI
Plast av allar hægstu dygd og net serframleitt til okkara pressur



- Betri fóður
- Skjótari liðugt
- Lætt at handfara

Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo

SLÁIMASKINUR
IÐ SLÁA ALT
- 2+2 gear ella 6+2 gear (báðar vegir)
- Prísir frá kr. 16.350 til 31.000



Knívar í ymiskum støddum frá 71 til 148 cm

Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo

Keypssamtøkan í Hoyvík
FK matstovan í Hoyvík søknast eftir



Fólki til køkin
at byrja sum skjótast
Starvið umfatar alt vanligt arbeiði í einum matstovukøki.
Arbeiðstíðin verður um 30 tímar um vikuna.
Løn:
Sambært sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag
Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran, Maud Matras, tel 314149
FK Hoyvík
Att. Maud Matras
Brekkutúni 9
Postboks 349
FO-188 Hoyvík